# Magnus Heinason - Túrfrágreiðing
# Yvirlitstroling á Føroyabanka. Túrur nr. 1840.
# Tíðarskeið: 5/9-11/9 - 2018

**Fólk við frá Havstovuni:** Poul Vestergaard, Durita Sørensen, Ian Salter, Marit Pedersen og Petur Steingrund.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund, ið eisini var toktleiðari.

**Endamál:** Hetta var triði túrurin av yvirlitstrolingunum á heysti í ár. Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Umframt skuldi vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd. Eisini skuldu magakanningar gerast av toski, hýsu, upsa, brosmu, longu og blálongu.

**Eyka uppgáva:** Nakað av toski, hýsu og mathøgguslokki varð selt til matstovuvinnuna í Havn. Nytrur vóru eisini tiknar av brosmu, longu og blálongu. Ian Salter tók prøvar av sjógvi til sínar kanningar av e-DNA.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinham lemmar. Breitlar 60 og 120 m. CTD-in. Miniloggarar.

**Um túrin:** Vit fóru av Havnini mikukvøldið 5/9 kl 22. Tóku støðir hósdagin í norðara/eystara parti av bankanum og fríggjadagin mitt á bankanum. Leygardagin tóku vit støðir í vestara kanti. Sunnudagin og mánadagin tóku vit støðir suður/vesturi á bankanum. Tóku allar 29 trolstøðirnar. Ein støð, har korallir eru, varð tikin og eingin korall kom í trolið, tá trolað varð neyvt eftir strikuni á plottaranum. Allar 12 CTD-støðirnar vórðu tiknar. Veðrið var sera gott allan túrin. Vóru á Havnini týsdagin kl. 13:30 og landaðu sama seinnapart.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri. Tal av nytrum var bert eftir ætlan fyri hýsu (umleið 400). Vit fingu ov lítið av toski og upsa til at náa ætlaða talið av nytrum.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 11. september. Ynskiligt er, at nytrurnar skulu vera lisnar og innlagdar í databasu í seinasta lagi 1. desember.

**Fyribilsúrslit:** Tað var framvegis lítið til av toski (Talva 1, Mynd 1). Hetta var toskur av øllum støddum og ikki bert sera stórur toskur eins og vanligt plagar at vera. Tað var nógv til av hýsu, líka nógv sum metárið 2002 (Mynd 1) og var hetta hýsa í øllum støddum. Tað hevur verið nógv til av longu seinastu 5 árini, men í ár var minni at fáa. Tað var lítið til av upsa (Mynd 1), mathøgguslokki og gulllaksi, men framvegis nógv av havtasku (Mynd 2). Nøgdin av silvurmurti og glýsufiski øktist nógv eftir at nøgd av toski, hýsu og upsa minkaði í 2005, men er nú komin niður á eitt vanligt støði (Mynd 3). Magakanningarnar vístu, at tað var nakað til av smáari og stórari nebbasild, meðan nøgdin av krabbadýrum var sera lítil.

**Talva 1**. Veiða, og nytrur og magar tikin á túri 1840 – yvirlitstroling á Føroyabanka.

| FISKASLAG | KG í 2018 | Nytrur | Magar | KG í 2017 | Lutfall 2018/2017 |
|---|---|---|---|---|---|
| HÝSA | 34541,393 | 433 | 120 | 14522,019 | 2,38 |
| UPSI | 1359,352 | 87 | 28 | 125,835 | 10,80 |
| HAVMÚS | 1195,971 | | | 1886,754 | 0,63 |
| TOSKUR | 430,630 | 75 | 57 | 378,428 | 1,14 |
| GULLLAKSUR | 337,309 | | | 265,020 | 1,27 |
| SVARTKJAFTUR | 312,695 | | | 782,369 | 0,40 |
| KNURRHANI | 279,391 | | | 73,781 | 3,79 |
| MATHØGGUSLOKKUR | 211,977 | | | 1093,441 | 0,19 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 190,078 | | | 146,446 | 1,30 |
| HVÍTINGUR | 175,293 | | | 94,003 | 1,86 |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 97,403 | | | 72,189 | 1,35 |
| LONGA | 95,845 | 15 | | 233,035 | 0,41 |
| GLÝSUFISKUR | 85,522 | | | 314,226 | 0,27 |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 74,488 | | | 84,665 | 0,88 |
| HAVTASKA | 67,535 | | 1 | 108,315 | 0,62 |
| GLASKVOYSA | 53,140 | | | 92,063 | 0,58 |
| SILVURMURTUR | 52,248 | | | 230,684 | 0,23 |
| ROSSAMAKRELUR | 49,695 | | | 0,000 | |
| STÓRI KONGAFISKUR | 29,680 | | | 72,125 | 0,41 |
| TUNGA | 25,712 | | | 27,128 | 0,95 |
| GAMAL FISKUR | 21,325 | | | 2,250 | 9,48 |
| REYÐI KNURRHANI | 20,357 | | | 0,000 | |
| SANDSPRØKA (LL) | 10,619 | | | 36,790 | 0,29 |
| SKRAMBUL | 6,653 | | | 0,455 | 14,62 |
| STREYMSILD | 4,259 | | | 3,256 | 1,31 |
| KALVI | 3,715 | | | 0,000 | |
| HVÍTINGSBRÓÐIR | 3,589 | | | 75,892 | 0,05 |
| SVARTBLETTUTA LANGASPORL | 3,523 | | | 8,737 | 0,40 |
| LÁLLA | 3,438 | | | 1,703 | 2,02 |
| BROSMA | 3,380 | 1 | | 7,470 | 0,45 |
| NEBBASKØTA | 3,245 | | | 0,000 | |
| NEBBASILD | 2,700 | | | 0,000 | |
| BÚKSVARTI HÁVUR | 2,670 | | | 10,070 | 0,27 |
| HVALSPÝGGJ | 1,465 | | | 0,000 | |
| BLÁLONGA | 0,610 | 1 | | 4,370 | 0,14 |
| HUMMARI | 0,250 | | | 0,305 | 0,82 |
| TILSAMANS | 39757,155 | 612 | 206 | | |




Mynd 1. Nøgd av toski, hýsu, longu og upsa per hál á Føroyabanka í september síðan yvirlitstrolingarnar byrjaðu í 1996.




Mynd 2. Nøgd av tungu, havtasku, mathøgguslokki og gulllaksi per hál á Føroyabanka í september síðan yvirlitstrolingarnar byrjaðu í 1996.




Mynd 3. Nøgd av silvurmurti og glýsufiski per hál á Føroyabanka í september síðan yvirlitstrolingarnar byrjaðu í 1996.

**Viðmerkingar:** Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru skrivaðar í dokumentinum ”Tur1840d.doc”.



Petur Steingrund